# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hungur og hall

Tað eru einki minni enn ræðandi tøl, sum FAO stovnurin undir ST leggur fram í hesum døgum. Sambært felagsskapinum svølta meira enn ein milliard fólk í heiminum. Hungur og hall er við at fáa fastatøkur á fleiri av heimsins fátækastu londum, her ikki minst í Afrika og í Asia.

Orsøkin til hesa sváru og óhugnaligu gongd - at so mangir av heimsins íbúgvum ikki fáa nokk til matna hvønn dag - er fyrst og fremst matvørukreppan, sum tók seg upp nøkur ár herfyri. Og nú kemur so fíggjarkreppan aftrat.

Prísirnir á matvørum og tí tilfari, sum verður brúkt til matvørur, hækkaðu bráddliga so mikið nógv fyri nøkrum árum síðani, at tað gjørdist nærum ómøguligt hjá teimum fátæku í teimum fátækastu londunum at føða seg og síni næstu. Fíggjarkreppan gjørdi bara hesa støðu uppaftur verri.

Aðalskrivarin í FAO sigur við altjóða miðlar, at støðan er katastrofal. Men hann leggur samtíðis dent á, at til ber at koma henni til lívs, um so er, at heimsins ríkastu lond taka seg um reiggj. Fíggjarkreppan rakar øll heimsins lond, sum tískil ikki hava somu orku til at taka sær av spurninginum um matvøruneyðina. Vit kunnu so bara vóna, at fíggjarkreppan fær ein skjótan enda, so hetta álvarsmálið – at ein milliard fólk svølta - fær hægri raðfesting í serstakliga teimum ríkaru londunum eitt nú í Vesturheiminum.

Vit mugu taka staðfestingarnar frá FAO og tess aðalskrivara í størsta álvara. Altjóðagerðin, globaliseringin, skuldi vera ein kærkomin gáva til heimin. At so stórur partur av heimsins íbúgvum livur undir hungursmarkinum kundi bent á, at altjóðagerðin ikki á hesum øki hevur megnað at ganga á odda til tess at beina fyri hunguri og halli.

Tørvurin á bíligum matvørum eigur at fáa hægstu raðfesting í tíðini, sum kemur. Heimsins ríkastu lond eiga at taka orðini hjá aðalskrivaranum í FAO til sín og fylgja ráðum hansara. At ríkaru londini bara gerast ríkari og tey fátækari gerast fátækari er ein gongd vit hava sæð leingi, og tað kennist, sum heimurin bara stendur og hyggur at hesi skeivu gongd, uttan at gera nakað fyri at venda henni. Tað kann gerast galin endi, um vit í ríkaru londunum ikki taka okkum um reiggj og gera okkara fyri at koma matvøruneyðini í fátækasta partinum av heiminum til lívs.

**Sosialurin**

## Hvat billar Óli Jacobsen sær inn?

**DAN REINERT PETERSEN**



Av orsøkum sum eg altíð kann venda aftur til, komu óteljandi áheitanir frá sjómonnum til mín um at stilla upp til formann í Fiskimannafelagnum fyri trimum árum síðani. Havi siglt av og á síðan mín 15-ára føðingardag, og júst tá hevði eg siglt nøkur ár. Kenni eitt sindur til lógarsmíð og havi stórt sæð roynt allar driftir so eg helt meg vera kompetentan. Fiskimenn brúktu sín demokratiska rætt, høvdu álit á mær og skutu meg upp. Eg bað tó ikki um nakran stillara sjálvur. Valið gekk ikki eftir vild, men tað havi eg langt síðani lagt aftur um meg.

Havi eisini hildið meg kunna farið óskammaðan millum fólk og gjørt nyttu har eg havi verið. Men her er Óli ikki samdur við meg.

Í síni herferð móti sitandi formanni, sum eg havi mína hugsan um, men ikki skal gera viðmerkingar til, uttan eg verðið provokeraður til tað, skrivar Óli hetta brotið (Sosialurin 13. okt):

“*Men sum ofta er, tá nakað gongur væl, er tað teir, sum bjóða seg til at kunna gera tað enn betri.*

*Hetta hendi eisini við formansvalinum fyri trimum árum síðani. So mikið var tó alment kent um hesar avbjóðarar, at tað avgjørt eingin grund var til at halda, at teir kundu gera nakað sum helst betri enn nakar sum helst annar fyri at siga tað diplomatiskt*”.

Av tí at eg var annar avbjóðarin, fari eg beinleiðis at spyrja Óla Jacobsen: Hvat var alment kent um mín persón, sum fær teg at skriva sum tú gert? Tey, ið eru rundan um meg, og eg sjálvur meta skuldsetingina rættiliga álvarsama, og krevji eg tí svar sum skjótast. Og onki uttanumtos.

Og til Jan Muller: Er tað so, at Óli Jacobsen ikki kann stýra sær sjálvum, so hevur tú sum ábyrgdarblaðstjóri skyldu til at gera tað ella taka fylgjurnar.

## Stórur dagur hjá Klaksvíkar kommunu í dag!

**ELSEBETH G. HANSEN**
forkvinna í sosialu nevnd



Klaksvíkar býráð hevur í dag fingið játtað stuðul til 24 røktarheimspláss í Klaksvík. Møguleiki er fyri at útbyggja hetta til 48 búpláss seinni.

So skjótt fíggingin er klár, verður farið ígongd beinanvegin við útfylling og projektering. Eftir hetta fer sjálv byggingin í gongd.

Samgongan valdi at raðfesta eldraøkið høgt. Bráðfeingistørvurin í Norðoyggjum er 32 røktarheimspláss, so hesi 24 plássini gera góðan mun.

Samgongan valdi somuleiðis at arbeiða fyri at fáa fleiri almenn og støðug arbeiðspláss hendanvegin. Tá røktarheimið eftir ætlan stendur liðugt um uml. 3 ár verða uml. 35 nýggj støðug arbeiðspláss í kommununi og tað er at frøast um.

Byggingin av røktarheiminum gevur haraftrat nógv arbeiði í byggitíðini til arbeiðsmenn og handverkarar og kemur tað væl við í hesum tíðum.

Hetta er ein sera stórur dagur fyri Norðoyggjar, og eg eri sera glað og takksom fyri at landstýriskvinnan í almannamálum Rósa Samuelsen valdi at raðfesta Klaksvíkar kommunu við 24 røktarheimsplássum.

Ætlaða røktarheimið er eitt av mínum hjartamálum. Og hevur hetta verið alt stríði vert, nú landsstýriskvinnan Rósa Samuelsen kunngjørdi, at hon hevði valt at raðfesta Klaksvíkar kommunu við 24 røktarheimsplássum.

Nógvar aðrar góðar kreftir hava somuleiðis lagt stórt arbeiði í hetta, og tað er eisini at fegnast um. Eisini stendur eitt samt býráð aftanfyri verkætlanina.

## Óskiljandi framferð

**CHRIS JAN MICHELSEN**

Uppskotið um havnargjøld og frítøku hjá strandfaraskipunum er nú úti til hoyringar. Í viðmerkingunum stendur at orsøkin er sparingar. Vit, sum hava fylgt við, vita at beinleiðis orsøkin er kravið frá Tvøroyrar Kommunu um havnargjald fyri Smyril. Hetta var longu nevnt í samskiftinum, áðrenn nøkur sparing kom fyri.

At frítaka skip fyri gjøld er kanska ikki heilt ókent. Tað verður gjørt í útjaðaraøkjum(eitt nú í Grønlandi), har man metir tænastuna at ganga frá miðdepulinum og út til økir, har havnaviðurskifti eru ógreið bæði víðvíkjandi umsiting og atløgu. Eisini verður roknað við at hesi øki ikki hava nakra lokala virðisøking, sum ger at upplandið kann gera rætt galdandi til at krevja gjald av vøruflyting. Heldur er tænastan at rokna sum landsins áhugi í at hava fólk búgvandi í útjaðaranum til tess at fremja territorialan upphavsrætt.

At so onkur kann meta Suðuroynna ikki at klára at greiða síni egnu havnarvíðurskiftir sambært galdandi kommunulóg, og ikki at verða verda, við sínari virðisskapan til føroyska samfelagið, at roknast sum framleiðslueind, er so sínar sakir, men at so Suðuroyingar, av sínum eintingum, á egnum lógvum bera hesa hugsan niðan á ting, er óskiljandi. Í hvussu so er: Teir áttu at vita betur.

Her eru nógv virkir, ið hóast kappingarmun í mun til meginøkið, bæði viðvíkjandi krónum og tíðum, royna at halda síni arbeiðstól gangandi og geva sítt íkast til føroyska búskapin. Tey vera nú av sínum egnu roknaði sum njótandi, men ikki gevandi.

Skammast tit ikki!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.